Spenningur inntil síðsta leik

Eftir tvey friðarlig umfør endaði einki talv við remis, tá síðsta umfarið var á skránni páskaaftan

FM Í TALVI
Jóannes Hansen

Tað var spenningur inntil síðsta leik í FM kappingini fyri einstaklingar, sum Sandavágs Talvfelag skipaði fyri í felagsskúlanum á Giljanesi. Undan níggjunda umfarinum vóru John Rødgaard og Hans Kristian Simonsen á odda við 5 1/2 stigi, og Ólavur Simonsen og Eyðun Nolsøe vóru teimum á baki við fimm stigum.

Skírisdag og langa fríggjadag gekk tað friðarliga fyri seg. Í næstsíðsta umfarinum langa fríggjadag endaðu øll talvini uttan eitt remis. John Rødgaard vann á Eyðni Nolsøe. Tað var hetta talvið, sum eftir tvey tey fyrstu umførini varð mett at verða avgerandi fyri FM heitið. Tað tóktist leingi at ganga friðarligt og javnt fyri seg, men eftir at Eyðun Nolsøe hevði býtt frýrnar upp, fekk John Rødgaard tann fyrimunin, sum hevði við sær, at hann fekk fult, og harvið undan síðsta umfarinum legði seg upp á síðuna av Hans Kristiani Simonsen.

Men John kiksaði í síðsta umfarinum ímóti unglinganum Martini Poulsen. Og tá Hans Kristian við svarta fólkinum vann á Carl Eli Nolsøe Samuelsen var greitt, at Hans Kristian var nýggjur meistari.

Tapið hjá John hevði við sær, at Ólavur Simonsen og Eyðun Nolsøe høvdu møguleikan at sleppa upp á heiðursmerkjapallin, og teir tóku báðir av. Ólavur vann í síðsta umfarinum við hvíta fólkinum á Rana Nolsøe, og Eyðun vann við hvíta fólkinum á Terja Petersen.

Lyklatalvini

Nýggi meistarin, Hans Kristian Simonsen, tapti einki talv. Eyðun Nolsøe tapti tvey talv, og tað var serliga kostnaðarmikið fyri hann, at hann í triðja umfarinum tapti ímóti Hans Kristiani Simonsen.

Ólavur Simonsen tapti bara eina ferð. Hevði hann ikki við hvíta fólkinum havt tapt ímóti Hans Kristiani Simonsen, so hevði Ólavur fyri fyrstu ferð vunnið FM. Tað gjørdi hann ikki, og eingin á Giljanesi ivaðist í, at Hans Kristian hevði meistaraheitið uppiborið.

KTF væl við

Tað var altso Kollafjørður, sum fór avstað við gullinum. Hans Kristian Simonsen var bestur, og hann hevði tveir klaksvíkingar í hølunum.

Í unglingadeildini vóru talvglaðu klaksvíkingarnir bestir. Rúni Dragaberg, sum áður hevur verið nær við at vinna FM, helt hesa ferð stílin alla tíðina. Hann vann seks talv og telvaði tvær ferðir remis. Annað remis talvið var í fjórða umfarinum ímóti liðfelaganum Ebbe F. Petersen, sum var næstbestur saman við Rógva Mortensen úr Havnini. Rani Baldursson úr Klaksvík endaði á fjórða plássi.

Í almenna bólkinum var Finnbjør Vang úr Klakvík bestur. Hann fekk sjey av átta møguligum stigum og tapti einki talv.

Hjá teimum tilkomnu var Jákup Thomsen úr Havnini bestur. Hann vann øll seks talvini. Næstbestur var Eyðun Samuelsen úr Miðvági. Hann fekk 3 1/2 stig.

Landsliðsbólkurin

Nr.	Telvari	Felag	Rating	1	2	3	4	5	6	7	8	9	Stig
				Umfar									
1	Terje Petersen	KTF	2100	10 0	2 0	3 0	4 =	5 =	6 0	7 0	8 =	9 0	1,5
2	Rani Nolsøe	KTF	2154	9 0	1 1	10 0	3 1	4 =	1 1	5 =	6 =	7 =	8 0	4,5
3	Olaf Berg	HT	2032	8 =	9 0	1 1	2 0	10 =	4 0	5 0	6 =	7 =	1 1	3,5
4	Hans K. Simonsen	KT	2157	7 =	8 1	9 1	3 =	2 =	3 1	10 =	5 =	6 =	1 1	6,5
5	Martin Poulsen	HT	2111	6 1	7 =	8 0	9 0	1 =	2 0	3 1	4 =	10 =	1 1	4,5
6	Carl Eli N. Samuelsen	HT	2107	5 0	10 =	7 =	8 0	9 =	1 1	2 =	3 =	4 0	3,5
7	Torkil Nielsen	ST	2054	4 =	5 =	6 =	10 =	8 0	9 0	1 1	2 =	3 0	3,5
8	Ólavur Simonsen	KTF	2190	3 =	4 0	5 1	6 1	7 1	10 =	9 =	1 =	2 1	6
9	Eyðun Nolsøe	KTF	2220	2 1	3 1	4 0	5 1	6 =	7 1	8 =	10 0	1 1	6
10	IM John Rødgaard	VT	2291	1 1	6 =	2 1	7 =	3 =	8 =	4 =	9 1	5 0	5,5

Almenni bólkurin

Nr.	Telvari	Felag	Rating	1	2	3	4	5	6	7	8	
				Umfar								
1	Finnbjørn Vang	KTF	1945	10 1	6 1	2 1	3 =	8 1	4 =	5 1	7 1	7
2	Andrias Ziska	HT	1864	11 1	5 1	1 0	17 1	4 0	3 =	8 1	10 1	5,5
3	Bernhard Augustinusen	ST	1862	12 1	9 1	8 =	1 =	5 1	2 =	10 1	6 1	6,5
4	Ingolf Gaard	KTD	1765	13 =	17 =	10 1	7 =	2 1	1 =	6 0	9 1	5
5	Jákup á R. Andreasen	VT	1728	14 1	2 0	15 1	16 1	3 0	8 =	1 0	12 1	4,5
6	Jónfinn Thomsen	ST	1685	15 1	1 0	13 0	12 1	16 1	7 1	4 1	3 0	5
7	Jón Mikkelsen	VT	1646	16 =	8 0	14 1	4 =	13 1	6 0	17 1	1 0	4
8	Jákup D. Joensen	VT	1624	16 =	8 1	14 =	4 1	13 0	6 =	17 0	14 1	4,5
9	Vagn Heldarskarð	KTF	1562	BYE 1	3 0	17 0	11 0	14 1	13 1	15 1	4 0	4
10	Heri Christoffersen	ST	1501	1 0	12 1	4 0	15 1	17 1	11 1	3 0	2 0	4
11	Herluf Mortensen	HT	1465	2 0	14 =	16 0	9 1	BYE 1	10 0	13 =	17 1	4
12	Óla J. Thomsen	GT	1415	3 0	10 0	BYE 1	6 0	15 =	16 1	14 1	5 0	3,5
13	Bárður Joensen	VT	1315	4 =	16 =	6 1	8 0	7 0	9 0	11 =	BYE 1	3,5
14	Jan Simonsen	KTF	1258	5 0	11 =	7 0	BYE 1	9 0	15 =	12 0	8 0	2
15	Martin Jóanesarson	VT		6 0	BYE 1	5 0	10 0	12 =	14 =	9 0	16 =	2,5
16	Heðin Joensen	ST		7 =	13 =	11 1	5 0	6 0	12 0	BYE 1	15 =	3,5
17	Jóannes Örtind	ST		8 =	4 =	9 1	2 0	10 0	BYE 1	7 0	11 0	3

Unglingar

Nr.	Telvari	Felag	Rating	1	2	3	4	5	6	7	8	
				Umfar								
1	Rúni Dragaberg	KTF	1710	14 1	8 1	6 1	5 =	2 1	24 1	7 1	10 =	7
2	Rani Baldursson	KTF	1446	15 1	7 =	9 1	3 1	1 0	5 =	24 1	6 =	5,5
3	Helgi D. Ziska	HT	1270	16 1	10 =	4 =	2 0	12 1	8 =	9 =	5 0	4
4	Rógvi Hansen	VT	1230	17 1	9 0	3 =	11 1	10 =	7 0	23 1	24 =	4,5
5	Ebbe F. Petersen	KTF	1220	18 1	12 1	24 1	1 =	7 1	2 =	6 =	3 1	6,5
6	Rógvi Mortensen	HT	1218	19 1	13 1	1	10 =	14 1	23 1	5 =	2 =	5,5
7	Jóhannus Johannesen	VT	1122	20 1	2 =	10 =	12 1	5 0	4 1	1 0	8 1	5
8	Fribjartur Olsen	HT	1105	21 1	1 0	25 1	13 1	24 0	3 =	11 =	7 0	4
9	Rógvi Dragaberg	KTF	1060	22 1	4 1	2 0	24 0	26 1	10 =	3 =	11 0	4
10	John M. Andreasen	VT	1038	23 1	3 =	7 =	6 =	4 =	9 =	14 1	1 =	5
11	Jón Gregersen	ST	1025	24 0	20 1	14 =	4 0	16 1	21 1	8 =	9 1	5
12	Pætur Breckmann	HT	1000	25 1	5 0	17 1	7 0	3 0	14 ---	---	---	2
13	Jóhan H. Ellefsen	MT	1000	26 1	6 0	16 1	8 0	21 0	18 1	25 =	19 1	4,5
14	Heri Thomsen	GT	1000	1 0	21 1	11 =	17 1	6 0	12 1	10 0	16 =	4
15	Eilif Arge	KTF		2 0	24 0	20 1	26 0	18 0	22 1	19 0	17 1	3
16	Danny Baldursson	KTF		3 0	23 1	13 0	21 =	11 0	17 1	20 1	14 =	4
17	Fróði Gregersen	ST		4 0	22 1	12 0	14 0	19 =	16 0	21 0	15 0	1,5
18	Óli Hammer	HT		5 0	25 0	23 0	22 1	15 1	13 ---	---	---	2
19	Herborg Hansen	KTF		6 0	26 0	22 1	23 0	17 =	20 1	15 1	13 0	3,5
20	Andreas Nielsen	ST		7 0	11 0	15 0	25 0	22 =	19 0	16 0	26 =	1
21	Ingi W. Joensen	MT		8 0	14 0	26 1	16 =	13 1	11 0	17 1	25 1	4,5
22	Gudmund Niclasen	MT		9 0	17 0	19 0	18 0	20 =	15 0	26 1	23 0	1,5
23	Rógvi E. Nielsen	ST		10 0	16 0	18 1	19 1	25 1	6 0	4 0	22 1	4
24	Andras Ortind	ST		11 1	15 1	5 0	9 1	8 1	1 0	2 0	4 =	45
25	Helgi Poulsen	ST		12 0	18 1	8 0	20 1	23 0	26 1	13 =	21 0	3,5
26	Høgni Svabo	MT		13 0	19 1	21 0	15 1	9 0	25 0	22 0	20 =	2,5

Slangur til øll endamál

Súgvislangur
Luftslangur
Spulislangur
Koplingar
Slanguklemmur
Skoytir
o.a. tilhoyr

Til fiskavirkir, alistøðir, byggivirkir, havnir, stovnar & skúlar

Avmarkað nøgd á goymslu

Kaj Andreasen & Co
Heilsøla, smásøla og umboð - Tel. 315600 - Fax 318008

Mentanarkvøld í Kollafjarðar skúla

MENTAN
Tíðindaskriv

Kollafjarðar Fornminnisfelag og Kollafjarðar Bygdarsavn hevur í nøkur ár skipað fyri fyrilestrum um ymsu býlingarnar í bygdini og tey fólkini, har hava búð. Hóskvøldið 21. mars helt Ólavur Clementsen fyrilestur um Sjóvargarð og fólk, sum eru ættað haðani. Hóskvøldið 4. apríl kl. 19.30 verður skipað fyri mentanarkvøldi í skúlanum í Kollafirði. Hetta er framhald av fyrilestrarkvøldinum hjá Ólavi Clementsen. Vit fara at hoyra fólk siga frá tí, tey minnast frá umhvørvinum við Sjógv. Við Sjógv er miðdepilin í bygdini. Umframt søguriku bóndagarðarnar báðar, hevur kirkjan staðið við Sjógv, alt tað fólk vita um.

Í nýggjari tíð hevur skúli og posthús verið har, so tað er eyðsæð, at har savnaðist nógv fólk.

Eisini verður nakað gjørt burtur úr einum av teimum mongu skøldunum, sum hava sínar røtur við Sjógv. Talan er um Tummas Napoleon Djurhuus. Tummas N. sleit sínar barnaskógvar í Líðini í Kollafirði. Hann er kendur sum yrkjari, og serliga eru tað hansara skemtiligu tættir, fólk munnu minnast. Vit fara at hoyra kór og einstaklingar framføra nakað av tí, Tummas N. Djurhuus hevur yrkt. Tey ið luttaka við sangi og upplestri: Kristiliga Sangkóri við Hanusi Joensen sum leiðara, Hanus G. Johansen, Jens Marni Hansen, Bjørn Djurhuus. Frásøgufólk: Poula Christiansen og Díðrikur Joensen

Kjakfundur á Café Natúr

POLITIKKUR
Tíðindaskriv

Í kvøld, mikukvøldið, kl. 20.00 verður lívligt kjak á Café Natúr. Evnið,ið kjakast verður um, er Íbúðarviðurskifti. Valevnir fyri allar politiskar flokkar verða við. Tey, ið leita sær oman á Cafe Natúr, fáa eisini møguleika at koma til orðanna.

Orðstýrari á kjakfundinum verður Jón Brian Hvidfeldt.

Hetta kjakkvøldið er fyrta tiltakið í einum rød av tiltøkum, sum Unga Tjóðveldið og Sosialistiskt Ungmannafelag í felag fara at skipa fyri í apríl mánaði.

Indiskir marknaðardagar í SMS

TÍÐINDASKRIV

Týsdagin 2. apríl lat søluframsýning upp á Torginum í SMS.

Søluframsýning verður rópt "indiskir marknaðardagar", og tá tú hevur sagt indiskt, mást tú eisini siga gávuhandilin MANGO í SMS. Og tað er eisini MANGO, sum skipar fyri marknaðardøgunum.

Undanfarnu søluframsýningarnar hjá MANGO hava verið rættuliga væl vitjaðar, og Sita Rajani, sum eigur handilin, vónar, at framsýningin hesaferð ikki verður nakað undantak. Tí tað er nógv at koma eftir! "Nógvar av indisku vørunum í handlinum verða seldar fyri sera lágar prísir. Vit hava valt hópin av indiskum vørum úr okkara úrvali. Hesar hava vit síðan bólka í ávísar prísbólkar, og sigast skal, at tað allarmesta verður selt fyri ógvuliga bíligan penga", sigur Sita.

Indisku marknaðardagarnir hjá MANGO hava opið til og við hósdagin 4. apríl.

KT Slekt: Granska ætt á internetinum

Føroyska ættargranskingarfelagið, KT-Slekt, er eitt forum fyri ættargranskarar, sum fyri tað mesta brúka teldu í granskingararbeiðinum, m. a. við at skipa fyri, at ættargranskingarkeldur verða teldutøkar

ÆTTARGRANSKING
Tíðindaskriv frá KT Slekt



Formaðurin í íslendska Ættfræðifelagnum, Ólafur H Oskarson, varð gestarøðari á fundinum hjá KT Slekt. Her sæst hann saman við formanninum í KT Slekt, Göran Wennerstrøm

Felagið KT Slekt bleiv stovnað 1. februar 2001. Endamál felagsins er at skapa eitt forum fyri ættargranskarar, sum fyri tað mesta brúka teldu í sínum arbeiði. Hetta verður gjørt m.a. við at skipa fyri at ættargranskingarkeldur verða teldutøkar. Mesta samskifti millum limirnar fer fram um Internetið. Felagið hevur í dag um 150 limir úr Føroyum, Danmark, Noreg, Íslandi og Grønlandi.

1. Ársaðalfundurin hjá KT Slekt varð haldin 16. februar 2002. Ársaðalfundurin varð, eins og stovnandi fundurin, hildin í ÍSF-húsinum. Nevndin, sum bleiv vald á stovnandi aðalfundinum í fjør, verður sitandi til næsta ár, so nevndarval var ikki neyðugt. Tó blivu tveir tiltaksnevndarlimir valdir, og teir eru nú Peter Kehlet og Eirikur Ólason Simonsen. Í nevndini sita annars formaður Göran Wennerstrøm, næstformaður Hans Suni Jensen, skrivari Randi Á Jakobsen, kassameistari Sofus Johannesen og netvørður Steinbjørn í Dali.

Formaðurin í íslendska Ættfræðifelagnum, Ólafur H Oskarson, varð gestarøðari og segði hann frá arbeiðinum í teirra felag. Áhugavert varð at hoyra Ólaf greiða frá. Íslendska felagið gevur eitt blað út, og har standa ofta greinar um ættarbondini millum Føroyar og Ísland.

Við sær hevði Ólafur stórfingna bókagávu. Talan er um fólkateljingar úr Íslandi, umframt fleiri hefti,ið teirra felag gevur út. Hettar hava limir í KT Slekt møguleika at lána heim frá felagnum.

Bøkurnar eru: Manntal Á Íslandi 1845, Suðuramt, Vesturamt Norður- og Austuramt, Manntal Á Íslandi 1910. I Skaftafellssýslur, II Rangárvallasýsla og Vestmannaeyjar, III Árnessýsla, IV Gullbringusýsla og Kjósarsýsla

Gávugrunnur Sparikassans

Gávugrunnur Føroya Sparikassa hevur latið felagnum stórfingna peningávu á kr. 40.000. Peningurin skal nýtast til stóru verkætlanina, sum felagið er fari undir og sum umfatar at fáa allar fólkateljingar teldutøkar. Hetta arbeiði er longu fari í gongd og nú eru meira enn 50 fólkateljingar teldutøkar á heimasíðuni hjá felagnum. Innskrivingararbeiðið av fólkateljingum verður gjørt sjálvboðið av limum í felagnum. Verkætlanin verður gjørd í samstarvi við Landsskjalasavnið.

Nýggjar verkætlanir

Felagið hevur avgjørt at fara undir tvær nýggjar verkætlanir. Tann eina verkætlanin hevur sum endamál at savna saman ein orðalista við orðum, sum eru tengd at ættargransking. Hin verkætlanin er at arbeiða fyri at fáa eitt teldutøkt yvirlit yvir gravir í Føroyum. Fyrimyndin er www.gardur.is, sum í dag umfatar neyva skráseting av meira enn 80.000 íslendskum kirkjugarðsgravum.

Felagið KT Slekt hevur sína egnu heimasíðu, sum er at finna á www.genealogi.fo. Internetið er sera hent hjá ættargranskarum, tí nógv er at finna og fjarstøðan er ongin, líka mikið hvar man er staddur í verðini. Nógvir eru føroyingarnar uttanlands og hesir kunnu eins væl og herbúgvandi føroyingar, gera brúk av heimasíðuni www.genealogi.fo.

Á heimasíðuni er eisini eitt kjaktorg, sum verður dúgliga nýtt til eftirlýsingar eftir ættarfólki og annars kjak um ættargranskingarmál. Eisini ber til at tekna seg sum lim á heimasíðuni.

433 bilar skrásettir higartil í ár

BILAR
Eirikur Lindenskov

17% fleiri nýggir bilar vóru seldir fyrstu tríggjar mánaðirnar í ár

Sølan av nýggjum akførum tríggjar teir fyrstu mánaðirnar í ár er vaksin við 17%. Nýggjastu hagtølini frá Bileftirliti Føroya vísa, at tilsamans 433 nýggj akfør eru skrásett í ár mótvegis 370 sama tíðarskeið í fjør.

Sama tíðarskeið í fjør var talið av nýggjum akførum 370. Talan er um ein vøkstur upp á 63 akfør – ella 17,03%

Tað eru serliga persónbilarnir, sum seta dám á hagtølini. Av teimum 433 nýggju akførunum eru 336 persónbilar og 69 vørubilar. Skrásettir vóru eisini 14 viðfestisvognar, sjey hýruvognar, fýra bussar, ein lastvognur, ein leguvognur og ein motorsúkkla.